


*Kvinnufótbóltur í Føroyum er nærum at javnmeta við KÍ. Í fjør fingu gyltu kvinnurnar tó harðan dyst, og Rannvá Andreasen vónar, at kappingin í ár verður eins spennandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tú mást vísa títt virði

## Mongu gullmerkini í Klaksvík eru úrslit av einum hugburði, sum flestu onnur feløg mangla, heldur Rannvá Andreasen, sum saman við KÍ nú fer eftir níggjunda FM-gullinum á rað

Tosar tú um føroyskan kvinnufótbólt, so slepst illa uttan um at tosa um KÍ. Kvinnurnar úr Klaksvík eru at kalla føroyska svarið upp á Rosenborg, og seinastu átta árini er FM-gullið endað í Klaksvík.

Fleiri ferðir er hetta hent uttan nevniverda mótstøðu, og tí hevur kappingin til tíðir verið lítið áhugaverd. Í fjør helt spenningurin sær tó allan vegin.

Í næst seinasta dystinum á árinum var KÍ enntá aftanfyri 2-0 móti avbjóðarunum úr B36, men meistararnir reistust tó somikið, at nær sagt lívsneyðugi javnleikurin kortini fekst til høldar.

### Stuttligt í fjør

Eins og so ofta fyrr, so var Rannvá Andreasen tann, sum sendi avgerandi bóltarnar í meskarnar í tí dystinum. Og tó at hon hesa ferð mátti lata Malenu Josephsen um gylta skógvin, so fall heiðurin sum ársins spælari í 2007 til Rannvá.

- Tá spenningur er um hvønn dyst, er sjálvandi stuttligari at spæla. Vit royna sjálvandi altíð at seta okkum upp, hvørja ferð vit fara á vøllin. Men í fjør trýsti B36 okkum allan vegin, og tað økir sjálvandi um stuttleikan í kappingini. Tí vit vistu, at vit als ikki høvdu ráð at kiksa eina tí einastu ferð, sigur Rannvá.

Um tað verður B36, sum fer at trýsta tær eins nógv í komandi kappingarárinum, dugir Rannvá ikki at siga. Og tað tykist sum so heldur ikki vera so øgiliga áhugavert hjá henni at meta um.

- Tær hava fingið nakað av tilgongd, men tær missa so sanniliga eisini týðandi spælarar. Tær mugu í øllum førum spíla seg út, tí tað er ikki tann stóra menningin, um tú bara hevur eitt gott ár, fyri síðani at fella niður aftur.

- Og hjá okkum nyttar heldur ikki at hugsa um árið í fjør. Vit hava nógvar dystir, sum vit skulu spæla í ár. Sjálvandi er spenningurin í løtuni størstur um dystirnar móti B36. Men vit mugu so sanniliga ikki gloyma, at allir hinir dystirnir skulu spælast. Ongan tíð betri, enn um kappingin verður líka spennandi aftur í ár, men fyri okkara viðkomandi ræður altíð um at taka hvønn dyst í størsta álvara, sigur Rannvá.

### Besta hópin

Um KÍ-liðið heldur hon annars, at tær eru púrasta til reiðar til enn einaferð at verja FM-gullið.

- Vit hava mist nakrar týðandi spælarar. Men har eru eisini nýggjar, sum koma upp. Millum annað eru einar fimm, sum enn hava aldur til 14-17, sum heilt víst høvdu byrjað inni hjá hinum feløgunum, men sum nú spakuliga koma inn á liðið hjá okkum.

Tað sigur kanska eisini nakað um, at breiddin hjá tykkum er størri, enn hon er hjá kappingarneytunum?

- Ja, heilt avgjørt. Eg vil siga tað so, at har onnur hava eitt gott lið, hava vit ein sera góðan hóp. Sum spælari ger tað eisini, at tú ert noydd at geva teg til hvørja tí einastu venjing, og tað ger aftur liðið betri.

### Huburðurin á muni

Og so kundi kanska verið lagt afturat, at sterkar kvinnur ikki best finnast á fótbóltsvøllinum í Klaksvík. Eisini innan kvinnuhondbólt tykist Klaksvíkin vera í flokki fyri seg.

Og spurd um hendan veruleika heldur Rannvá, at tað kanska fyrst og fremst er hugburðurin, sum er á muni.

- Eg kann sjálvandi ikki siga, hvussu tað er í hinum feløgunum. Men eg havi varhugan av, at tær ikki leggja eins nógv fyri har. Kanska kundi tú sagt, at fótbólturin er meira sosialur í hinum feløgunum.

- Og eg kenni tað aftur, tá vit venja við landsliðnum. Mín hugburður tá er í øllum førum, at eg SKAL á liðið. Har haldi eg, at fleiri av spælarunum úr hinum feløgunum eru meira smædnar.

- Og tann hugburðurin er eisini galdandi innanhýsis á liðnum hjá okkum. Tað ger, at tær ungu, sum koma upp, so sanniliga mugu vísa nakað, fyri at vera við. Sjálvandi stuðla vit teimum og eggja teimum til. Men har verður eingin fríbillett givin inn á liðið.

----------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*